| | | |
|---|---|---|
| | **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**28. apríl 2010** | Blað nr.:<br>**8464**<br>Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** **28. apríl 2010** **kl. 17.45**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr: 48/10-70/10**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Bogi Andreasen
Marin Katrina Frýdal
Jógvan Arge
Elin Lindenskov
Jákup Símun Simonsen
Maria H. Olsen
Annfinn Brekkstein
Levi Mørk
Jan Christiansen
Sjúrður Olsen

**LUTTÓKU IKKI:**
Halla Samuelsen
Vagnur Johannesen

**LUTTÓK EISINI:**

**SKRIVARI:**
Ingibjørg Berg

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18.00

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

Halla Samuelsen og Vagnur Johannessen eru burturstødd og hava boðað frá, at tey ikki luttaka á fundinum. fráboðanin er tikin til eftirtekar.

**52/10** **2010-0177**

**Mál beind í nevndir**

**Býráðið 28. apríl 2010:** Tikið til eftirtektar.

**53/10** **2010-0546**

**Framfluttar játtanir frá 2009 til 2010**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í sambandi við at roknskapurin fyri 2009 verður gjørdur upp, verður eisini gjørt eitt yvirlit yvir rakstrar- og íløgujáttanir at flyta til 2010.

Hesar skulu játtast í býráðnum sum eyka játtan. T.v.s. við tveimum viðgerðum.

Yvirlitið verður lagt fram saman við fyribils roknskapinum fyri 2009.

**Fíggjarnevndin 10. mars 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta framflyting av t.kr. 4.879, netto, til rakstur og t.kr. 136.103, netto, til íløgur.

**Býráðið 18. mars 2010:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 28. apríl 2010:** Einmælt samtykt.

**54/10** <u>2010-0672</u>

**<u>Serstøk byggisamtykt økið millum Tinghúsvegin, Sverrisgøtu, Niels Finsens gøtu og Bøkjarabrekku.</u>**

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
Í sambandi við at Havnar Arbeiðsmannafelag søkti um byggiloyvi at víðka um bygningin á matr. nr. 414e og 114b við Tinghúsvegin (mál nr. 2009-0871) var avgjørt at gera eina serstaka byggisamtykt fyri økið millum Tinghúsvegin, Sverrisgøtu, Niels Finsens gøtu og Bøkjarabrekku. Orsøkin til hetta var, at ætlaða byggingin á ognunum var væl hægri enn almenna byggisamtyktin loyvdi og við at gera eina serstaka byggisamtykt loyvir almenna byggisamtyktin einum samlaðum nettonýtslustigi upp á 2,0 fyri økið, sum byggisamtyktin fevnir um.

Avtalað var at ráðgevin hjá Havnar Arbeiðsmannafelag skuldi standa fyri tí praktiska arbeiðinum við at gera serstøku byggisamtyktina. Í hesum sambandi var tað samlaða nettonýtslustigið fyri allar ognirnar í økinum, sum byggisamtyktin fevnir um, útroknað. Úrslitið av hesum vísti, at samlaða nettonýtslustigið var omanfyri 2,0.

Tí var avgjørt, at broyta almennu byggisamtyktina soleiðis, at mest loyvda nettonýtslustigið í 1. grundumráði í serstakari byggisamtykt var broytt frá 2,0 til 3,0 (mál 2009-3006). Nú er skriv komið frá Innlendismálaráðnum um at tey fara at góðkenna hesa broytingina.

Serstaka byggisamtyktin fyri økið millum Tinghúsvegin, Sverrisgøtu, Niels Finsens gøtu og Bøkjarabrekku, ið er ein skipan av hvussu nógv kann byggjast her, verður løgd fram á fundinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at nevndin tekur undir við sertsøku byggisamtyktini fyri økið millum Tinghúsvegin, Sverrisgøtu, Niels Finsens gøtu og Bøkjarabrekku

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. mars 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

**Býráðið 28. apríl 2010:** Einmælt samtykt.

**55/10** **<u>2009-2973</u>**

**Hotspot í miðbýnum**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Fyrispurningur er komin frá býráðslimi um, at umsitingin kannar møguleikarnar, at kommunan veitir alnótaratgongd, gjøgnum sokallað 'Hotspots'.

Kt-deildin hevur, fyrr í ár, gjørt ávísar kanningar og fyrispurningar og er tilfarið hjálagt sum skjøl:

- **Skjal 1: Det globale netværk.**
  Danskur serfrøðingur lýsir hvat liggur í hugtakinum 'Det globale netværk' og kemur við fleiri góðum hugtøkum, eins og víst verður á hvussu hetta kann gerast
- **Skjal 2: Løgfrøðislig frágreiðing frá Løgdeildini**
  Løgdeildin heldur ikki, at kommunan hevur rætt ella skyldu til at veita ókeypis tráðleyst alnótasamband til øll.
- **Skjal 3: Svar frá Innlendismálaráðnum**
  Innlendismálaráðið heldur heldur ikki, at tað er í samsvar við kommunufulltrúnna, at kommunan veitir ókeypis alnótasamband til øll.

Uppskotið frá politikaranum um, í fyrstu atløgu, at veita alnóta-atgongd innanhýsis í kommunalum bygningum er eitt gott stað at byrja. Tað er avmarkað til at ganga einari umbøn frá gesti um at fáa alnótasamband inni í einum kommunalum bygningi á møti. Tað er ikki í stríð við løgfrøðina.

Næsta stigið kundi verið at veitt bátagestum, bilgestum og øðrum ferðandi atgongd til alnótina.

Hugtakið 'Hotspot' hevur fleiri týdningar ella loysnir. Við støði í løgfrøðiligu niðurstøðunum er kommunan nakað bundin í hesum málinum. Hóast kommunan kundi keypt eitt ella fleiri tráðleys breiðbandshald til bygningarnar, sum eru í uppskoti, so er tað ikki ein virðilig loysn fyri eina kommunu.

Tað skulu nevniliga gerast kanningar, bæði um hvørjir veitarar skulu veita loysnina, hvør tøkni skal brúkast, hvør skal reka loysnina, og hvørji atlit skulu takast, so tað ikki stendst løgfrøðisligur ruðuleiki av nýtsluni av alnótini.

Vit sleppa sostatt ikki undan stýring av, hvør fær atgongd, so tað setir beinanvegin spurningar um tøkni og mannagongdir, til dømis hvussu ein fær atgongd og hvør skal geva hana. Tørvur á atgongd er ofta eftir vanliga arbeiðstíð, so tað setir avmarkingar til hvør er tøkur. Í uppskotinum standa Reinsaríðið, Perlan og Býarbókasavnið nevnd. Hetta eru støð, har manning er tøk, sum kann veita atgongdina.

Fara vit í aðru syftu at veita ferðandi alnótasamband ber ikki til at siga hvat tað kemur at kosta, tí tað krevur neyvar kanningar. Til at geva atgongdina hava vit tó døgnvakt á Tórshavnar havn og á Sløkkiliðnum.

Tað er upplagt at kanna, um áhugi er millum virkir at reka skipanina.

Hóast alt hetta finst í grannalondunum, so er neyðugt hjá okkum at kanna, hvørji serlig føroysk atlit eru at taka.

Sum útgangspunkt skal brúkarin rinda fyri tænastuna soleiðis, at hon er útreiðsluneutral fyri kommununa.

**Tilmæli:**
Miðfyrisitingarstjórin og KT-leiðarin mæla í fyrstu atløgu til at kanna møguleikan, at uttanhýsis veitarar kunnu loysa uppgávuna.

Í øðrum lagi verður mælt til, at stjórnin mannar ein bólk at gera eina verkætlan, sum fevnir um

- Stig 1: at veita alnótasamband til gestir í Perluni, Reinsarínum og Býarbókasavninum
- Stig 2: at veita alnótasamband til ferðandi

og leggur hana fyri fíggjarnevndina. Samstundis verður mælt til, at settar vera kr 200.000 av til fyrra stigið.

**Fíggjarnevndin 18. november 2009:** Samtykt at taka undir við at kanna møguleikan at uttanhýsis veitarar kunnu loysa uppgávuna.

**Ískoyti:**
Levi Mørk hevur biðið um hetta mál á skrá.

**Býráðið 26. november 2009:** Framlagt.

**Ískoytið:**
Fyrisitingin hevur havt fund við tveir veitarar, Føroya Tele og Elektron.

Føroya Tele er ikki sinnað at gera eina HotSpot loysn, men vísir á teirra nýggja 3G net. 3G netið er eitt tráðleyst net, sum hvør einstakur keypir eitt hald til. Ein týðandi munur á einari HotSpot loysm og so 3G netinum er, at fleiri kunnu brúka eitt HotSpot meðan bara ein kann brúka eitt 3G hald.

Elektron er áhugað í at kanna hvussu ein HotSpot loysn kann snikkast til, men vil hava kommununa at taka ein aktivan lut í forkanningini. Forkanningin kostar millum 50-100 tús kr. og mælir Elektron til, at Tórshavnar kommuna og Elektron býta hesa útreiðslu.

Tað er skilligt, at veitarar standa ikki í kø at sleppa at gera eina HotSpot skipan.

Kt-deildin hevur í verandi líki ikki manning tøka at taka sær av uppgávuna.

**Tilmæli:**
Vísandi til løgfrøðiliga notatið og at eingin veitari í býnum er áhugaður í at loysa uppgávuna sjálvur mæla miðfyrisitiningarstjórin og kt-leiðarin til, at Tórshavnar kommuna ikki ger meira við málið.

**Fíggjarnevndin 10. mars 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum vísandi til, at Innlendismálaráðið ikki metir, at Tórshavnar kommuna hevur loyvi at seta upp Hot Spots í miðbýnum við tí fyri eyga at veita ókeypis internetatgongd til øll áhugaði innanfyri eitt ávíst øki.

**Nýtt:**
Levi Mørk biður um at fáa málið á skrá.

**Býráðið 28. apríl 2010:** Tikið av skrá.

**56/10** **<u>2010-0544</u>**

**<u>Uppskot til raðfesting av íløgum á konto 6275 fríðkan av býnum og konto 6575 kirkjugarðar</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
**Íløguætlanaruppskot 2010:**
Vísandi til fíggjarkarmin, sum samtyktur varð í býráðnum tann 26. november 2009, so eru tøkar til íløgur tils.: 5,0 mill.
Býttar soleiðis:
6.11.32.111 Fríðkan av kommununi (Løguj.) 3.000
6.24.51.111 Kirkjugarðar (Løguj.) 2.000

Til fundirnar í ymisku býráðsnevndunum í fíggjarætlanartilgongdini, varð framløgd niðanfyri standandi raðfesting. Við hesum verður biðið um, at nevndin góðkennir og staðfestir raðfestingina.

Konto 6275 íløgur fríðkan av býnum

| Jour.nr. | Arbeiði | Kostnaður |
|---|---|---|
| 2009-3144 | Nólsoy, gøta frá skúlanum til dagstovnin | 120.000 |
| 2009-3143 | Ùtvegan/keyp av tilfari til gøtur | 200.000 |
| 2009- | Viðarlundin í | 250.000 |

| | | |
|---|---|---|
| 3123 | Havnardali- gøtur v.m. | |
| 2000-2675 | Viðarlundin í Marknagili- gøtur,mold v.m. | 250.000 |
| 2009-2182 | Sandá- útvegan av lendi til gøtur | 160.000 |
| 2009-1580 | Purku- og Lambagerði fríøki | 350.000 |
| 2006-1384 | Velbastaður úthegn, rørportur v.m. | 500.000 |
| 2009-1992 | Sandá gangibrúgv | 350.000 |
| 2009-2012 | Reinsaríið, tún, trappa v.m. | 700.000 |
| 2009-3139 | Tjarnargarður, skipan av túni, stakitt,planting | 120.000 |
| | **Samanlagt** | **3.000.000** |

Konto 6575 íløgur kirkjugarðar

| J.our.nr. | Arbeiði | Kostnaður |
|---|---|---|
| 2004-0061 | Skipan av B2/B3 við miðøki, gøtum, grótgarði | 1.370.000 |
| | Garður móti ringvegnum | 400.000 |
| | Stuðlagarður við gravarahúsið | 50.000 |
| | Projektering eftirlit | 180.000 |
| | **Samanlagt** | **2.000.000** |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla teknisku nevnd til at taka undir við raðfestingini, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 4. mars 2010:** Nevndin samtykti at mæla til, at játta kr. 700.000 til gerð av uttanumsøkinum kring Reinsaríið (j. nr. 2009-2012), og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina. Samstundis verður heitt á umsitingina um at lýsa omanfyri standandi samlaða uppskot til íløgur fyri 2010 á konto 6275 og 6575, á næsta fundi í byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd.

**Fíggjarnevndin 10. mars 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 18. mars 2010:** Einmælt samtykt.

| Jour.nr. | Arbeiði | Kostnaður |
|---|---|---|

| | | |
|---|---|---|
| 2009-3144 | Nólsoy, gøta frá skúlanum til dagstovnin | 120.000 |
| 2009-3143 | Ùtvegan/keyp av tilfari til gøtur | 200.000 |
| 2009-3123 | Viðarlundin í Havnardali- gøtur v.m. | 250.000 |
| 2000-2675 | Viðarlundin í Marknagili- gøtur,mold v.m. | 250.000 |
| 2009-2182 | Sandá- útvegan av lendi til gøtur | 160.000 |
| 2009-1580 | Purku- og Lambagerði fríøki | 331.000 |
| 2006-1384 | Velbastaður úthegn, rørportur v.m. | 500.000 |
| 2009-1992 | Sandá gangibrúgv | 350.000 |
| 2009-2012 | Reinsaríið, tún, trappa v.m. | 700.000 |
| 2006-1344 | Kirkjugarður á Svínaryggi rekkverk,gøtur.v.m. | 139.000 |
| | **Samanlagt** | **3.000.000** |

Konto 6575 íløgur kirkjugarðar

| J.our.nr. | Arbeiði | Kostnaður |
|---|---|---|
| 2004-0061 | Skipan av B2/B3 við miðøki, gøtum, grótgarði | 1.370.000 |
| | Garður móti ringvegnum | 400.000 |
| | Stuðlagarður við gravarahúsið | 50.000 |
| | Projektering eftirlit | 180.000 |
| | **Samanlagt** | **2.000.000** |

**Ískoyti:**
Munur á konto 90-1038-38011, ymiskar ábøtur á kirkjugarðin á Svínaryggi, kr. 139.000 skal mótroknast í 2010, soleiðis at Tjarnargarður, skipan av túni, stakitt, planting kr. 120.000 verður strikað og somuleiðis kr. 19.000 av Purku- og Lambagerði fríøkinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla byggi- og býarskipanarnevndini til at taka undir við nýggju raðfestingini, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

- Tóri í Hoyvík var við á fundinum og greiddi frá.
- Levi Mørk var ikki við til hetta mál.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. mars 2010:** Kunnað varð um málið.

**Tekniska nevnd 8. apríl 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum, tó at mál nr. 2007-1580 Dalurin Langi – planting, verður útsett, vísandi til at kanningar um møguliga staðseting av fótbóltsvølli eru í gerð, smb. j.nr.: 2010-0498.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2010:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd tann 8. apríl 2010.

**Býráðið 28. apríl 2010:** Einmælt samtykt.

**57/10** **2002-0790**

**Valbjørn Dalsgarð: Umsókn um byggiloyvi til 6 randarhús á matr. nr. 42a, Argir**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Valbjørn Dalsgaard hevur í skrivi, dagf. 15. mars 2002, søkt um loyvi at byggja randarhús á matr. nr. 42a, Argir (Revatrøðin), og hevur í skrivi, dagf. 10. juli 2002, frá umsitingini fingið upplýst, at umsóknin um byggiloyvi ikki kann viðgerast vísandi til, at Hóvabrekka ikki er kommunalur vegur, og at atkomu-viðurskiftini til omanfyri nevnda matrikul eru ógreið.

Valbjørn Dalsgaard hevur sett seg í samband við eigaran av matr. nr. 56 ca, sum er Føroya landsstýri (almanna- og heilsumálaráðið og mentamálaráðið). Ráðini hava sett seg í samband við Landsverkfrøðingsstovnin fyri at fáa eina tekniska meting av málinum, og í skrivi, dagf. 11. mars 2004, frá Landsverkfrøðings-stovninum verður mælt frá at økja um nýtsluna á Hóvabrekku, vísandi til hallið á brekkuni og útsýnið móti Reynsgøtu.

Hóvabrekka er ikki gjørd sambært teimum teknisku ásetingunum, ið eru galdandi í dag, og vildi tískil ikki verið góðtikin sum atkomuvegur. Men við tað at Argja kommuna í síni tíð hevu latið gera slíkar atkomuvegir, sum ongantíð eru yvirtiknir, og at hesir hava verið nýttir í mong ár, er neyðugt hjá teknisku nevndini at taka støðu til atkomuviðurskifti á Hóvabrekku, og um kommunan skal yvirtaka Hóvabrekku – hetta í sambandi við fyriliggjandi umsókn frá Valbjørn Dalsgaard.

**Tilmæli:**

Tað fer ikki at bera til at broyta hallið á Hóvabrekku, og tað verður trupult at betra um útsýnisviðurskiftin frá Hóvabrekku út móti Reynsgøtu. Men við tað at talan er um eitt íbúðarøki, og at Hóvabrekka verður beinkað og at gjørd verður gongubreyt, mæla tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin til, at nevndin tekur undir við fyriliggjandi uppskoti frá Valbjørn Dalsgaard at gera Hóvabrekku - tó við teirri broyting, at útsýnisviðurskiftini verða broytt samsvarandi uppskoti frá umsitingini

**Tekniska nevnd 4. mai 2004:** Nevndin er sinnað at loyva atkomu eftir Hóvabrekku til bygging á matr. nr. 42a treytað av,

at vegurin verður gjørdur 6 m breiður, umframt gongubreyt á aðrari síðuni.
at útsýnið út á Traðagøtu verður betrað.
at umsøkjarin fær eina avtalu við eigaran av ognini á matr. nr. 42b, har vegurin skal gerast.
at vegurin annars lýkur tær treytir, sum kommunan setir til kommunalar vegir.
at projekt verður lagt fyri nevndina aftur til góðkenningar.

**Ískoyti:**
Valbjørn Dalsgaard hevur havt samráðingar við almanna- og heilsumálaráðið um nýtslurætt á Hóvabrekku í sambandi við ætlan hansara um at byggja á matr. nr. 42a, Argir (eigari: sp/f Valbjørn Dalsgaard).

Hann hevur víst á, at almanna- og heilsumálaráðið hevur sett sum treyt, at eingin ferðslurættur skal verða til matr. nr. 41a, Argir (eigari: Marita Blástein v.fl). Henda ognin hevur bert atkomumøguleika til Hóvabrekku, tí tað fer at verða trupult at gera atkomuveg oman í Traðargøtu vegna vánaligt útsýni og plásstrot millum verandi ognirnar, matr. nr. 41b og 42h, Argir.

Umsitingin er av teirri áskoðan, at treytirnar, sum almanna- og heilsumálaráðið nú ætlar at seta, ikki eru í samsvari við heildarætlanina á økinum, sum Argja kommuna á sinni hevur latið gera.

Ynski er, at nevndin tekur støðu til, um kommunan skal halda fast við, at ognin matr. nr. 41a, Argir, skal hava atkomurætt frá Hóvabrekku ella ikki.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til, at nevndin heldur fast við, at ognin matr. nr. 41a, Argir, skal hava atkomurætt frá Hóvabrekku og at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina til endaliga staðfesting.

**Tekniska nevnd 14. desember 2004:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum.

**Tilmæli:**

Býararkitekturin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum og heitir á nevndina um reisa málið um yvirtøku av Hóvábrekku og beina málið í teknisku nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 2. februar 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá býararkitektinum.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til, at kommunan ognar sær lendið undir Hóvabrekku og at beina málið í fíggjarnevndina at taka støðu til gjald fyri íbinding v.m. hjá umsøkjaranum.

**Tekniska nevnd 8. desember 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2006:** Samtykt at taka upp samráðingar um at kommunan ognar sær Hóvabrekku.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at Tórshavnar kommuna yvirtekur vegin Hóvabrekka sambært uppskoti um avtalu við eigaran.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. januar 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at Tórshavnar kommuna yvirtekur vegin Hóvabrekka sambært uppskoti um avtalu við eigaran.

**Tekniska nevnd 17. januar 2008:** Tekniski stjórin gjøgnumgekk uppskot til avtalu.
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 31. januar 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

- Í sambandi við samráðingar við eigararnar av Hóvabrekku, eru ymisk viðurskfti, ið Landsverk hevur kravt, sum kunnað verður um.

**Tekniska nevnd 21. august 2008:** Kunnað varð um málið.

- Umsitingin leggur fram uppskot uv vegaføring, sum Landsverk kann taka undir við. Tekniska nevndin skal taka støðu til uppskot nr. 2.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Eingin peningur er settur av til verkætlanina. Metti kostnaðurin fyri sjálvt vegarbeiðið er uml. 1,5 - 2,0 mió. svarandi til ein meturprís álj. kr. 15.000,-. Tá eru útreiðslur fyri lendi ikki íroknað.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at arbeitt verður víðari við at detailprojektera, og at arbeiðið verður boðið út í innbodna lisitatión.

**Tekniska nevnd 7. oktober 2008:** Vísandi til umfatandi krøvini frá Landsverki fyri at yvirtaka vegin, samtykti nevndin at heita á býráðið um at kæra málið til Føroya landsstýri.

**Fíggjarnevndin 19. november 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 27. november 2008:** Einmælt samtykt.

- Kunnað verður um status í málinum.

**Tekniska nevnd 12. november 2009:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Kæra varð hin 26. jan. 2009 send Innlendismálaráðnum, um handfaring og treytirnar hjá Landsverk í samband við ætlaðu yvirtøkuna av Hóvabrekku, hjá Tórshavnar kommunu (j. nr. 2009-0790/72).

Hin 19. febr. 2010 hevur Innlendismálaráðið tikið støðu til kæruna. Kommunan fær ikki viðhald við tí grundgeving, at tað eru kommunal krøv til vegabreidd sum gera, at neyðugt er at takað lendi burturav matr. nr. 56ca og 55cc.

Málið er síðani viðgjørt á stjórnarfundi hin 09. mars 2010, og mælir stjórnin til, at leggja málið fyri byggi- og býarskipanarnevndina við tilmæli um, at kommunan ikki gera meira við málið um sundurbýtið av matr. nr. 42a, vísandi til at yvirtøkutreytirnar viðføra stórar útreiðslur fyri kommununa. Stjórnin umrøddi eisini spurningin, at tekniska nevnd eigur at viðgerða og takað støðu til, um kommunan skal seta verandi eigara av Hóvabrekku krav um, at vegurin verður gjørdur í tann stand sum landsstýrisins egni vegamyndugleiki, Landsverk, krevur innanfyri rímiliga freist, um vegurin framhaldandi skal nýtast sum atkomuvegur til Verkstaði Vón v.m.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til

1. **at** nevndin tekur støðu til, at kommunan ikki yvirtekur Hóvabrekku undir teimum treytum sum Landsverk setir, og at beina málið í býráðið um byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina

2. **at** nevndin tekur støðu til, um kommunan skal seta verandi eigara av Hóvabrekku krav um, at vegurin verður gjørdur í tann stand sum landsstýrisins egni vegamyndugleiki, Landsverk, krevur innanfyri rímiliga freist, um vegurin framhaldandi skal nýtast sum atkomuvegur til Verkstaði Vón v.m.
3. **at** umsitingin setir seg í samband við eigaran av matr. nr. 42a, Argir at greiða frá støðuni í málinum, herundir kostnaðinum av yvirtøkuni, og hvat tað vil viðføra av útreiðslum fyri privatu útstykkingarætlanina av matr. nr. 42a.

4. **Tekniska nevnd 8. apríl 2010:** Nevndin samtykti at:

1) kommunan ikki yvirtekur Hóvabrekku undir teimum treytum, sum Landsverk setur og beinir málið í býráðið um byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina
2) kommunan skal seta verandi eigara av Hóvabrekku krav um, at vegurin verður gjørdur í tann stand, sum landsstýrisins egni vegamyndugleiki krevur

3) umsitingin setur seg í samband við eigaran av matr. nr. 42a, Argir at greiða frá støðuni í málinum.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og teimum grundgevingum, ið nevndin hevur lagt til grund fyri avgerðini.

- Jan Christiansen fór av fundi, meðan hetta málið var til viðgerðar.

**Býráðið 28. apríl 2010:** Býráðið tekur til eftirtektar, at málið ikki hevur verið fyri aftur í byggi- og býarskipanarnevndini, og verður mett, at hetta ikki er neyðugt í hesum ítøkiliga førinum.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum.

**58/10** **2010-0647**

**Umsóknir til prekvalifikatión av Bussleiðini 2010**

Tórshavnar býráð samtykti tann 17. desember 2009, at útbjóðingin av bussleiðini skuldi bjóðast út sum prekvalifikation. Lýst varð í feburar mánað 2010 eftir arbeiðstakarum til at dríva bussleiðini tey komandi árini. Tá freistin var úti tann 15. mars 2010 høvdu 5 arbeiðstakarir/samtøk latið inn umbøn til Tórshavnar kommunu um at blíva prekvalifiseraðir.

Hesir eru:
1. Sp/f Gundurs Bussar
2. Stig Thomassen og Hans J. Kollslíð – vegna partafelag undir stovnan
3. P/F Mouritsen Bussar
4. Famjins Bygdaleiðir v/ Arnbjørn í Smiðjuni
5. Uni Mortensen – vegna partafelag undir stovnan

**Tilmæli:**
Við støði í notati nr. 2010-0647/7 mæla tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini til at undangóðkenna
1. Sp/f Gundurs Bussar
2. Stig Thomassen og Hans J. Kollslíð – vegna partafelag undir stovnan
3. P/F Mouritsen Bussar

**Tekniska nevnd 8. apríl 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd og undangóðkenna
1. Sp/f Gundurs Bussar
2. Stig Thomassen og Hans J. Kollslíð – vegna partafelag undir stovnan
3. P/F Mouritsen Bussar.

**Býráðið 28. apríl 2010:** Einmælt samtykt.

**59/10** **2009-0110**

**Bussleið: útbjóðing 2010**

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
**Kunning**
Nú Bussleiðin skal útbjóðast av nýggjum, eru tað nøkur viðurskiftir sum trímannabólkurin (Boði Haraldson, Jóannes S. Jensen og Katrin S. Nielsen) hava skift orð um, og sum skal umrøðast í teknisku nevnd:

**1. Farleiðirnar**.
Hvussu við núverandi leiðum og møguliga nýggjum farleiðum? Sum nú er dekka verandi farleiðir ein stóran part av økinum í Tórshavnar kommunu.
Eitt annað, sum eisini er vert at hava í huga er, hvussu langt skal tað verða frá teimum ymisku íbúðarøkinum til nærmasta bussstoppistað. Higartil hevur verið

arbeitt við at tað skal verða 300 – 350 metrar til nærmasta bussstoppistað. Kanska skuldi tað í framtíðini verðið 500 metrar til nærmasta bussstoppistað.

**2. Samstarv við Standfarskip Landsins SSL**
Møgulig samstarv við SSL (Bygdaleiðir) um farleiðina til Kollafjarðar og Velbastað/Kirkjubø?

**3. Jarðarferð**
Skal tað ásetast ein jarðarferðaleið, so at bussleiðin órógvast minst møguligt og ikki seinkast tá jarðarferðir eru inni í býinum.

**4. Bussar**
Hvat slag av bussum skal brúkast í tí nýggju útbjóðingini? Skal tað vera lágdyrkbussar og smærri bussar til útjaðaraøkini.

**5. Grønur profilur**
Skal tað kanska verða eitt krav, at ein EL-Bussar/Hybrid-bussur verður royndarkoyrdur í komandi loyvistíðarskeiðinum. Her verður serliga hugsað um umhvørviskrøv og hartil hoyrandi.

**6. Loyvistíðarskeið**
Hvussu langt skal loyvistíðarskeiðið verða í komandi útbjóðing? Skal tað verða 3 ár, 5 ár ella 7 ár?

**7. SMS-skipan**
Møguliga útbyggja eina SMS-skipan (ferðaætlan, seinkingar og avlýsingar), hetta fyri at kunna geva borgarunum, ið brúka bussleiðina, eina betri tænastu.

**8. Bussskúrarnir hjá Bussleiðini**
Ì komandi útbjóðingini skal komandi arbeiðstakari hava ábyrgdina av at viðlíkahalda endastatiónirnar hjá Bussleiðini.

**Tekniska nevnd 5. mars 2009:** Umsitingin kunnaði um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt eitt notat um málið og kunnar um gongdina av útbjóðingini av bussleiðini 2010.

**Tekniska nevnd 14. mai 2009:** Katrin S. Nielsen kunnaði um status í málinum.

- Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 3. september 2009:** Katrin S. Nielsen kunnaði um málið. Nevndin samtykti at halda serstakan fund at viðgera uppskot til útbjóðingartilfar.

- Umsitingin leggur fram uppskot til útbjóðingartilfar.

**Tekniska nevnd 1. oktober 2009:** Umsitingin legði fram 1. uppskot til útbjóðingartilfar fyri bussleiðina. Nevndin ynskir at umsitingin arbeiðir víðari við fyriliggjandi uppskoti fyri farleiðirnar og at útgreinað verður ítøkiligari kostnaðarmeting fyri leiðirnar 2 og 3 ferðir um tíman og leygardag og sunnudag.

**Ískoyti.**
Umsitingin leggur fram 1. uppskot til útbjóðingartilfar fyri bussleiðina við útdýpandi útgreiningum fyri leiðirnar 2 og 3 ferðir um tíman og leygardag og sunnudag sambært nevndarsamtykt frá 1. oktober 2009.

**Tekniska nevnd 8. oktober 2009:** Málið varð umrøtt.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur fram 2. uppskot til útbjóðingartilfar. Harumframt verður framlagt tilfar til prekvalifikatión til støðutakan.

**Tekniska nevnd 3. desember 2009:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Levi Mørk, Halla Samulsen og Jákup Símun Simonsen, samtykti at mæla býráðnum til at samtykkja fylgjandi:

1. At bjóða áhugaðum arbeiðstakarum ella samtøkum at senda umbøn um prekvalifikatión sambært skjal nummar 2009-0110/33.
2. At sáttmálaskeiðið verður 7 ár.
3. At bussarnir við sáttmálabyrjan, skulu vera í mesta lagið 2 ár.
4. At koyrt verður 3 ferðir um tíman, frá uml. kl. 07.30 til uml. kl. 17.00.
5. At koyrt verður leygardag frá kl. 10.00 til kl. 16.00.
6. At koyrt verður ikki sunnu- og halgidagar.
7. At tann síðsti tímin frá 23.00 til 24.00 verður spardur burtur.

8. At heimila umsitingini at samráðast við SSL (Bygdaleiðir), um samstarvs-avtalu at leggja fyri nevndina aftur.
9. At bert eitt samlað tilboð verður, innihaldandi allar leiðir.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur støðu á einum seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 9. desember 2009:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal, Elin Lindenskov og Jógvan Arge samtykti at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur støðu á einum seinni fundi.

**Býráðið fyri læstum hurðum 17. desember 2009:** Samtykt við 9 atkvøðum fyri og 4 ímóti við teirri útgreining, at talan er um ein leist hjá umsitingini at arbeiða eftir.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk og Maria Hammer Olsen.

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur fram 3. uppskot til útbjóðingartilfar saman við teimum seinastu broytingum.

Ì sambandi við farleiðina til Kollafjarðar, verður tað seinasta uppskotið til sáttmála við SSL lagt fram. Uppskotið í sáttmálanum leggur upp til, at Tórshavnar kommuna rindar max. kr. 1. mill. um árið til SSL, og tá hava allir borgararnir í kommununi møguleikan at brúka farleiðirnar hjá SSL innanfyri kommunumark.

**Tekniska nevnd 14. januar 2010:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Levi Mørk og Jákup Símun Simonsen, samtykti at taka undir við framlagda uppskoti um tíðarætlan, uppskot til sáttmála við SSL og 3. uppskot av útbjóðingartilfarinum (j nr 2009-0110/44), og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2010:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal, Elin Lindenskov og Jógvan Arge mælir til, at útbjóðingartilfarið letur upp fyri møguleikanum at geva alternativ tilboð upp á busskoyringina, ið leggja dent á CO2-sparing og umhvørvisvinarligar loysnir.

Meirilutin mælir býráðnum til at taka undir við avgerðini hjá teknisku nevnd tann 14. januar 2009. Aftur fyri fíggjarnevndina, áðrenn avgerð verður tikin um, hvør kann bjóða upp á busskoyringina.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur støðu á einum seinni fundi.

**Býráðið 28. januar 2010:** Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk og Maria Hammer Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Annfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti.**

Umsitingin hevur mett um tíðarætlanina og staðfestir, at út frá fyriliggjandi fortreytum ber ikki til at seta nýggju koyringina í verk til tann 1. oktober 2010.

Vist verður til tilmælið til fundin í teknisku nevnd tann 14. januar 2010 um at leingja verandi sáttmálar til 31. desember 2010.

**Býráðið 25. februar 2010:** Einmælt samtykt at leingja sáttmálarnar til 31. desember 2010.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur á borgarafundi við kollfirðingar fingið ymsar viðmerkingar til útbjóðingina og eisini havt kunnandi fundir við staðbundnar nevndir í Kaldbak, Velbastað og Kirkjubø.

Endurskoðað tíðarætlan fyri útbjóðingina av Bussleiðini verður framløgd á fundinum. Umsitingin sær ikki nakran møguleika fyri, at koyringin við nýggjum sáttmálaparti kann koma í gongd 1. okt. 2010, uttan so at stig verða tikin til at bíleggja framleiðslu av bussum nú, orsakað av longum veitingartíðum fyri nýggjar bussar.

**Tekniska nevnd 4. mars 2010:** Kunnað var um málið.

**Fíggjarnevndin 10. mars 2010:** Tekniski stjórin kunnaði um málið.

**Ìskoyti:**
Umsitingin leggur fram 4. uppskot til útbjóðingartilfar. Tær seinastu broytingarnar eru gjørdar við støði í borgarafundinum í Kollafirði, fundi við umboðini fyri tær staðbundnu nevndirnar i Kaldbak, Velbastað og Kirkjubø og hugaráksfundi. Umsitingin hevur arbeitt víðari við at fáa ynsktu broytingarnar við í 4. uppskot til útbjóðingartilfar.

1. At bussurin úr Kollafirði steðgar við Sandvíkarhjalla á veg suður til Havnar. Tað viðførur, at ein busslummi skal gerast í samstarvi við SSL og Landsverk. Útreiðslurnar til hesar fysisku karmarnar eru uml. kr. 250.000.

2. Er tað ikki nokk av plássi í bussinum hjá SSL at flyta øll tey ferðandi úr Kollafirði til Havnar og aftur, so skal tað verða nevnt í útbjóðingartilfarinum; at ein av eykabussunum við trygdarbelti verður brúktur at koyra fyrsta túrin kl. 07.10 frá Norðuri í Sundum og til Havnar og runt í Havnini og ein túr kl. 16.15 úr Havn norður til Kollafjarðar.

3. Tá tað er meira enn 20 min. at bíða eftir næsta bussinum hjá SSL uppi við tunnilsmunnan, so koyrir innanhýsis bussurin í Kollafirði leið 5 ikki niðan til tunnilsmunnan.

4. Broyting av ferðaætlanini, nær farleið 4 (Kaldbak – Kirkjubø retur) koyrir. Ætlanin var at koyra frá kl. 07.00 – 11.00 um morgunin og so aftur frá kl. 13.00 –

21.00 um kvøldið, men mælt verður til at koyra frá kl. 07.00 – 09.00 og so aftur frá kl. 11.00 – 23.00 um kvøldið.

5. At leið 4x (6) koyrir leygardagar kl. 10.00 úr Kaldbak – Tórshavn og aftur kl. 14.00 Tórshavn – Kaldbak.

6. Støddin av bussparkini verður íalt 16 bussar: 12 stórir bussar og 4 smáir.

Umsitingin kemur at kunna um úrslitið av seinastu ferðafólkateljingunum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkførðingur og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at taka undir við broytingunum.

**Tekniska nevnd 8. apríl 2010:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Elin Lindenskov, Jákup Símun Simonsen og Levi Mørk, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2010:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur fram endaligt uppskot til útbjóðing og kunnar um støðuna í málinum.

**Tekniska nevnd 22. apríl 2010:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Jákup S. Simonsen og Levi Mørk, tók undir við framlagda endaliga uppskotinum (j. nr 2009-0110/71) til útbjóðing av Bussleiðini, og at beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 28. apríl 2010:** Deildarleiðarin á teknisku deild greiddi frá málinum.

Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal, Elin Lindenskov og Jógvan Arge, mæla býráðnum til at taka undir við útbjóðingartilfarinum.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðið 28. apríl 2010:** Atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk og Maria Hammer Olsen tekur undir við tilmælinum.

Greiddi ikki atkvøðu: Sjúrður Olsen, Jan Christiansen og Anfinn Brekkstein.

**60/10** **2010-0815**

**Uppskot til roknskapin 2009 hjá Tórshavnar havn**

**Havnarnevndin 12. apríl 2010:** Góðkent og samtykt at mæla býráðnum til um fíggjarnevndina at góðkenna roknskapin.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini og góðkenna roknskapin.

**Býráðið 28. apríl 2010:** Roknskapurin einmælt samtyktur.

**61/10** **2010-0816**

**Grannskoðanarfrágreiðing 2009 hjá Tórshavnar havn**

**Havnarnevndin 12. apríl 2010:** Framløgd. Samtykt at leggja grannskoðanarfrágreiðingina fyri býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2010:** Samtykt at leggja grannskoðanarfrágreiðingina fyri býráðið.

**Býráðið 28. apríl 2010:** Frágreiðingin einmælt tikin til eftirtektar.

**62/10** **2009-1977**

**Nýtt atløgupláss til nólsoyarleiðina.**

Tað ljóðar, at Ternan skal røkja **n**ólsoyarleiðina ístaðin fyri Rituna, og at eitt nýtt skip skal byggjast til endamálið innan alt ov langa tíð.

Eftir áheitan frá landstýrismanninum í vinnumálum, sum eisini varðar av

Strandfaraskipum Landsins (SL), hevur fundur verið við SL, um at gera eitt hóskandi atløgupláss til tann broytta tørvin.

Á ástaðarfundi í Nólsoy við umboð og skiparar hjá SL varð mett, at nýggja atløguplássið má byggjast úti á Klyvum.

Umsitingin hevur gjørt ein leystliga meting av teimum møguleikunum sum eru, við tilhoyrandi kostnaðarætlan.

Havnin í Nólsoy er kommunal, og tí er tað uttan iva besta loysnin, at Tórshavnar havn stendur fyri einari møguligari útbygging.

Áðrenn endalig støða verður tikin til útbyggingina, má greiða fáast á fíggingini.

**Tilmæli:** Mælt verður til at arbeiða víðari við atløgumøgulekanum at liggja undir flakavirkinum, soleiðis at skipið liggur suður/norð og rampin er inn móti garðinum í sunnara enda.
Eisini verður mælt til at kunna SL um uppskotið, og at taka upp samráðingar við avvarðandi myndugleikar um gjald fyri nýtslu.

**Havnarnevndin 26. oktober 2009:** Samtykt at arbeiða víðari við atløgumøguleikanum at liggja undir flakavirkinum, soleiðis at skipið liggur suður/norð og rampin er inn móti garðinum í sunnara enda.

**Ískoyti:**
Byggiprogram er gjørt, sum leggur upp til bygging av atløgubryggju við fastari rampu úti á Klyvum.
Eisini leggur byggiprogrammið upp til, at skipið liggur eyst/vest, ístaðin fyri suður/norð, sum samtykt á havnarnevndarfundinum 26/10-2009. Hendan broytingin er gjørd, tí mett verður, at tað er lættari at koma til og frá bryggjuni, um gronin verður løgd upp ímóti vesturættini.
Við hesari loysnini verður bryggjan undir gamla flakavirkinum tøk til aðra skipaferðslu.

Úrdrag úr byggiprogramminum:

- 12 m breiður fastur rampi har opið er undir
- 20 m langur bryggjukantur
- Uppbygdar fendarar.
- Skipsfestir
- El- og vatnveiting.
- Kostnaðarmeting 8,5 mió.
- Byggitíð 5 mdr.

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:** Mælt verður til:
- at taka undir við byggiprogramminum.
- at játta kr. 300.000 til projektering.

**Nólsoyarnevndin 8. februar 2010:** Heðin Mortensen, Jan Christiansen, Kristian J. Hansen mæla havnarnevndini at taka undir við tilmælinum.

Vígdis Bjarnadóttir mælir til at leggja skipið inni í molakrókinum.

Nevndin mælir til, at terminalur verður gjørdur samstundis, sum fergulegan verður gjørd.

Samstundis verður mælt til at betra um atkomuna úti á Klivum.

**Havnarnevndin 15. februar 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at senda málið í byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevnd og í býráðið um fíggjarnevndina.

Havnarmeistarin Jónsvein Lamhauge var við á fundinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. mars 2010:** Nevndin tekur undir við byggiprogramminum.

**Tekniska nevnd 4. mars 2010:** Nevndin tekur undir við byggiprogramminum.

**Fíggjarnevndin 10. mars 2010:** Samtykt at hava fund við landsstýrismannin til tess at fáa greiðu á ymsum viðurskiftum viðvíkjandi ferjuni - hvørt talan er um eina fyribils ella varandi loysn – spurninginum um ein møguligan terminal í Nólsoy til ferðafólkini, spurninginum um havnapengar v.m.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2010:** Havnarmeistarin var við á fundinum og greiddi frá málinum.

Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggiprogramminum.

**Býráðið 28. apríl 2010:** Einmælt samtykt.

**63/10** **<u>2010-0338</u>**

**<u>Dýping av Tórshavnar havn suður úr Tinganesi.</u>**

Í skrivi til Tórshavnar havn, dagfest 5. apríl 2006, heitir Strandfaraskip Landsins á Tórshavnar havn, um at virka fyri at dýpa økið suður úr Tinganesi. Saman við áheitanini er ein frágreiðing frá skiparunum á Smyrli og Norrønu. Í frágreiðingini frá skiparunum verður víst á, at um tað grunna suður úr Tinganesi verður dýpt,

gerðst tað munandi tryggari hjá skipunum at koma inn í havnina, tí tá passa skipini millum Tinganes og molan, uttan at vandi er fyri at tey taka botn.

Tórshavnar havn hevur áður víst á, at havnin hevði verið munandi tryggari, um tað grunna suður úr Tinganesi bleiv dýpt, og kunnu tí taka undir við ynskinum hjá skiparunum

Av tí at økið liggur so nær fornminnunum í Tinganesi, hevur tað verið tætt samskifti við Fornminnisnevndina, um loyvi til at dýpa.

Fyri at tryggja fornminnini í Tinganesi, hevur landsstýriskvinnan í mentamálum avgjørt at friða umliggjandi øki kring Tinganes. Friðingin forðar ikki fyri at tað verður dýpt, men hetta skal gerast í samráð við Fornminnisnevndina.

Dýpingin snýr seg um eitt umleið 3.800 m$^2$ stórt øki, sum er mett at kosta 6 mió.

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:** Mælt verður til at seta ætlanina í verk, at fíggja av íløgukarminum hjá Tórshavnar havn fyri 2010.

**Havnarnevndin 15. februar 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at gera byggiprogram.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini og gera byggiprogram.

**Býráðið 25. februar 2010:** Einmælt samtykt.

Byggiprogram er gjørt.

Úrdrag úr byggiprogramminum:

- Leiðbeiningin frá Oricia, sum eru serfrøðingar í spreinging, skulu fylgjast.
- Treytir frá Føroya Fornminnissavni, skulu fylgjast.
- Øki sum skal dýpast- spreingjast 3.200 m$^2$
- Øki sum skal dýpast - bleytur botnur 600 m$^2$
- Kostnaðarmeting 6. mió.

Ætlanin er, at arbeiðið skal vera liðugt ultimo november 2010.

**Tilmæli frá havnameistaranum:** Mælt verður til:
- at taka undir við byggiprogramminum
- at játta kr. 150.000,- til projektering av íløgum hjá Tórshavnar havn fyri 2010.

**Havnarnevndin 12. apríl 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini og taka undir við byggiprogramminum og játta kr. 150.000,- til projektering av íløgum hjá Tórshavnar havn fyri 2010.

**Býráðið 28. apríl 2010:** Einmælt samtykt.

**64/10** **2009-1877/4 SG** (gl. j.nr. 2002-0908)

**Gøtunøvn í Kollafirði**

Í sambandi við gøtunøvn og talmerking í Kollafirði, sum vórðu samtykt og kunngjørd í mai 2002, eru klagur komnar, og tær koma framvegis til teknisku umsitingina hjá Tórshavnar kommunu. Umsitingin hevur heitt á gøtunavnanevndina um at viðgera gøtunøvnini í Kollafirði av nýggjum, møguliga í samráð við fyrrverandi gøtu-navnanevndina í Kollafirði. Málið verður tikið upp aftur eftir summarfrítíðina, tá tekniska umsitingin hevur fyrireikað málið.

**Gøtunavnanevndin 10. juni 2009**: Kunnað varð um málið, sum verður tikið upp aftur eftir summarfrítíðina.

**Uppískoyti:**
*Húsagøta*
Borgarar í Kollafirði hava víst á ónøgd um, at gøtunavnið "Húsagøta" er burtur. Víst verður á, at navnið var gamalt og kom frá gomlu gøtuni, sum gekk niðan til húsini "í Húsinum", matr. nr. 105, áðrenn útstykkingin niðanfyri varð gjørd. Uppskot er, at Bøgøta skiftir navn til Húsagøta. Umsitingin hevði tað uppskot at brúka navnið Húsagøta til tey ovastu húsini matr. nr. 105 og 106, soleiðis at navnið fylgir tí søguliga.

**Gøtunavnanevndin 21. desember 2009:** Gøtunavnanevndin tekur undir við hesum, og mælir til, at gøtan til tey bæði ovastu húsini, matr. nr. 105 og 106, fær navnið *Húsagøta*.

Viðv. gøtunavninum Frammi í Dal:
Eftir áheitan frá limi í fyrrverandi gøtunavnanevndini í Kollafirði, var málið um navnið *Frammi í Dali* lagt fram. Tað var ongantíð ætlanin hjá gøtunavnanevndini í Kollafirði, at navnið skuldi vera Frammi í Dali, men Frammi í Dal, tí soleiðis verður tað sagt, og eingin kennist við hitt.

**Gøtunavnanevndin 21. desember 2009:** Gøtunavnanevndin hevur einki ímóti, at navnið verður broytt til *Frammi í Dal*, og mælir til, at tað verður gjørt.

**Uppískoyti:**

Av tí at hesi málini vórðu løgd fram sum kunningarmál á seinastu fundi, verða tey løgd fyri gøtunavnanevndina aftur til staðfestingar.

**Gøtunavnanevndin 1. mars 2010:** Staðfest.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælunum hjá gøtunavnanevndini: 1) Gøtan til tey bæði ovastu húsini, matr. nr. 105 og 106, fær navnið *Húsagøta* og 2) Navnið *Frammi í Dali* verður broytt til *Frammi í Dal*, og beina málið í býráðið.

**Mentamálanevndin 24. mars 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 28. apríl 2010:** Einmælt samtykt.

**65/10** **2010-0509**

**Navn til sambindingarvegin í Hoyvík**

**Lýsing av málinum, samandráttur:**
Í áheitan frá teknisku umsitingini verður sagt m.a.:

”Nú sambindingarvegurin er við at verða liðugur, skal vegurin hava eitt navn. Vegurin er ein ringvegur, hvar aðrir verða íbundnir. Ein møgulig framtíðar verkætlan, sum verður íbundin, er Stóra Tjørn.
Sum víst á kortinum er tað fyrsta strekkið, inn frá ”Vegurin Langi”, longu nevnt Klingran.”

**Gøtunavnanevndin 1. mars 2010:** Nevndin mælir til, at allur sonevndi sambindingarvegurin verður nevndur ”Klingran”.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við gøtunavnanevndini og beina málið í býráðið.

**Mentamálanevndin 24. mars 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 28. apríl 2010:** Einmælt samtykt.

**66/10** **2010-0072**

**Broyting av adressuni Velbastaðvegur 30 á Velbastað**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í skrivi til gøtunavnanevndina, dagfest 6. januar 2010, heitir Annfinn Brekkstein á nevndina um at taka málið viðv. matr.nr. 51b á Velbastað til nýggja viðgerð. Hann skrivar m.a.:

"Matr.nr. 51b á Velbastað hevur fingið nýtt gøtunavn og nýtt nummar. Nú er Velbastaðvegur 30 í Havn og á Velbastað, og báðar adressurnar eru í somu kommunu. Hetta er sera óheppið og villleiðandi.

Vegurin frá Ervavegnum og niðan til Kirkjubøvegin hevur fingið navnið Velbastaðvegur. Matr.nr. 51b hevur sostatt fingið navnið Velbastaðvegur 30.

Hetta hevur skapt undran millum Velbastaðfólk og onnur staðkent fólk á leiðini.

Har sum matr. nr. 51 b liggur eitur " Uppi á Heiðum", hetta tí lendið har sum gamla høsnarhúsið liggur (matr.nr.51b) eitur Uppí á Heiðum. Tí er tað sjálvsagt at vegurin eigur at eita **Uppi á Heiðum**, og ikki Velbastaðvegur."

**Gøtunavnanevndin 1. mars 2010:** Nevndin mælir til, at vegastubbin, har fyrrverandi høsnarhúsið hjá Annfinni Brekkstein er, fær navnið "Uppi á Heiðum", og at adressan hjá hesum bygningi verður broytt samsvarandi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við gøtunavnanevndini og beina málið í býráðið.

**Mentamálanevndin 24. mars 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og kanna eftir um tað eitur Uppi í Heiðum ella Uppi á Heiðum.

Nevndin samtykti at heita á umsitingina, um at taka upp spurningin um navnið Velbastaðvegur, sum nú kemur fyri 2 ferðir í kommununi.

**Ískoyti:**
Upplýst er, at rætta navnið er "Uppi á Heiðum".

**Býráðið 28. apríl 2010:** Einmælt samtykt, at vegurin fær navnið Uppi á Heiðum.

**67/10** **2010-0496**

**Reglugerð/arbeiðssetningur hjá gøtunavnanevndini**

**Lýsing av málinum, samandráttur.**
Á fyrstu síðu í gerðabókini hjá gøtunavnanevndini stendur:

"Tórshavnar Býráð samtykti 15. august 1961 í sambandi við brævið frá Petur Háberg at seta eina nevnd til tess, at

1) koma fram við uppskotum til nýggj gøtunøvn
2) kanna, fyrireika og fáa í lag gerð av modelli av tí gomlu Havnini.

Í hesa nevnd valdi býráðið:
Petur Háberg
Verland Johansen
Sverra Dahl
William Heinesen
Jóhs. Johannesen (í Mattalág)

Um neyðugt fær nevndin tekniska hjálp frá býarverkfrøðinginum."

**Gøtunavnanevndin 1. mars 2010:** Nevndin samtykti at heita á mentamálanevndina og býráðið um at endurskoða arbeiðssetningin hjá gøtunavnanevndini, sum er frá 1961.

Gøtunavnanevndin ynskir, at tað verður greiðari, hvørji mál hon skal viðgera. Ynskiligt er at fáa greiðu á, um gøtunavnanevndin kann taka mál upp av sínum eintingum, ella hon bert skal viðgera málini, hon fær áheitan um.

Í gøtunavnanevndini eru fólk við nógvari vitan, bæði um staðarnøvn, hús og annað, og nevndin heldur tað vera natúrligt, at hon, umframt at koma við uppskotum til gøtunøvn, eisini fær høvi at koma við ummæli ella útsøgn, tá nøvn skulu setast á eitt nú bygningar, torg og skúlar. Spurningurin um hús og nøvn á gomlum húsum var eisini frammi, og um gøtunavnanevndin skal ráðgeva í slíkum málum eisini.

Nevnast kann, at fyrrverandi ráðleggingarnevndin í Hoyvík, sum var ein undirnevnd hjá Gøtunavnanevndini, hevði høvi at viðgera navn til skúla og ítróttahøll í Hoyvík. Mál um minnisplátur hevur gøtunavnanevndin havt til ummælis, og nevndin hevur m.a. viðgjørt mál um at seta minnisplátur upp til minnis um báðar heiðursborgararnar í Havn, William Heinesen og M.C. Restorff, men nevndin er ikki liðug at viðgera tað.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at arbeiðssetningurin hjá gøtunavnanevndini verður:

"Gøtunavnanevndin er ráðgevandi nevnd hjá Tórshavnar býráði. Arbeiðssetningur hennara er soljóðandi: Gøtunavnanevndin kemur við uppskotum og ger tilmæli til mentamálanevndina um gøtunøvn, nøvn á torgum og øðrum slíkum nøvnum í kommununi eftir áheitan frá umsitingini. Eisini kann nevndin verða biðin um ummæli ella tilmæli um nøvn á bygningum hjá kommununi. Mentamáladeildin útvegar skrivara."

**Mentamálanevndin 24. mars 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 28. apríl 2010:** Einmælt samtykt.

**68/10** **2007-3478**

**Umsókn frá Verkfrøðingastovuni vegna P/F Poul Michelsen, P/F Ognarfelagið SK og P/F Postverk Føroya um broyting av almennu byggisamtyktini fyri B5-vinnuøki við Hoyvíksvegin og samsvarandi Broyting fyri Serstøku byggisamtykt nr. 7.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Ætlanin er at víðka B5-vinnuøki uml 27 m eystureftir, soleiðis at partar av 1316 a,1316 e (eigari P/F Poul Michelsen) og 1317 a (eigari P/F Ognarfelagið SK-P/F Postverk Føroya ) verða broyttir frá A1-øki til B5-øki í almennu byggisamtyktini og samsvarandi frá A2-øki til D-øki í serstøku byggisamtykt nr. 7.

Markið ímillum bústaðar- og vinnuøki hevur í dag eitt lítið knekk upp á uml. 27 m við ognina hjá P/F Postverk Føroya. Hetta kom tá ið byggisamtyktin var broytt í 1999, mál nr. 1999-1241 og 1999-1242.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at ganga umsóknini á møti og broyta almennu byggisamtyktina og serstøku byggisamtykt nr. 7 sambært kortskjali dagf. 31. jan 2008.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. februar 2008:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, treytað av at matrikulmarkini verða umskipað tilsvarandi.

**Býráðið 28. februar 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
1. juli var freistin at koma við mótmælum ella broytingaruppskotum til ætlaðu broytingina av byggisamtyktini við Óðinshædd.

Tvey mótmæli eru móttikin, eitt frá íbúgvunum á Óðinshædd og eitt frá eigarafelagnum Norðara Stoffalág.

Bæði mótmælini vísa á, at broytingin kemur at ávirka bústaðarøkið við øktum larmi og at við hesi broytingini kemur vinnuøkið at verða bæði omanfyri og niðanfyri teirra bústaðir.

Eisini vísa íbúgvarnir við Óðinshædd á, at kommunan lýsir ov illa tá ið ætlaðar broytingar verða kunngjørdar. Tey meina at ein greið orðing saman við einum týðiligum korti skal verða við kunngerðini.

Til hesi mótmæli er at siga, at tann parturin av vinnuøkinum, sum liggur nærmast teirra bústaði (grundøki hjá Postverk Føroya) ikki verður broytt og tí verður neyvan bygt meira á hesum økinum orsakað av ætlaðu broytingini. Á ognunum hjá P/F Poul Michelsen og Gummibátatænastuni verður møguleiki fyri útbyggingum, men hesar ognir liggja meira enn 100 m frá bústaðar økinum. Harafturat verður møguleiki fyri einum eitt sindur størri bygningi á ognini 1317c hjá P/F Ognarfelagið SK, sum liggur óbygt í løtuni.

Viðmerkingarnar um at ætlaðar byggisamtyktarbroytingar verða ov illa lýstar, hava møguliga nakað at gera við, at húsaeigararnir við Óðinshædd hava lagt sak ímóti kommununi um eina broyting í byggisamtyktini um B10 vinnuøki – niðanfyri vegin Óðinshædd – sum var gjørd í 1999.

Kunngerðirnar verða gjørdar sambært løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir við eini stuttari frágreiðing um hvat ætlaða broytingin snýr seg um, hvørjar ognir ætlanin fevnir um, hvar og nær tilfar liggur frammi, ið lýsir broytingarætlanina nærri og nær seinasta freist at mótmæla er.

Eisini hevur Verkfrøðingastovan boðað frá í einum telduposti at kortið ið hevur ligið frammi ikki samsvarar heilt við teirra umsókn (sí kort) og at í lýsingini av broytingini stóð “uml. 25. m eystureftir” ímeðan umsóknin var um uml. 27 m.

Hetta snýr seg um eina minni justering av markinum ímillum umráðispartarnar og kann helst gerast uttan at ætlanin verður løgd fram av nýggjum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at halda fast um ætlaðu broytingina vísandi til, at henda ikki fer at virka til økta ferðslu ella munandi økt óljóð í bústaðarøkjunum Óðinshædd og Norðara Stoffalág.

Eisini mæla tekniski stjórin og býararkitekturin til, at ætlaða broytingin verður justerað eftir umsóknini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. august 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 11. september 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Uppískoyti:**
Í sambandi við viðgerðina av broytingini av byggisamtyktini, sum Verkfrøðingastovan søkti um vegna P/F Poul Michelsen, P/F Ognarfelagið SK og P/F Postverk Føroya, var eitt minni ósamsvar ímillum umsóknina og kortið, sum broytingin var viðgjørd eftir. Hetta gjørdi umsøkjarin skrivliga vart við. Býráðið samtykti, at senda broytingina til endaliga góðkenning hjá Innlendismálaráðnum, justerað eftir umsóknini.

Innlendismálaráðið góðkendi ikki justeraðu broytingina, men bert eftir kortskjølunum, sum umsóknin var viðgjørd eftir og høvdu ligið frammi til almenna kunning.

Nú er so nýggj áheitan komin frá umsøkjarunum, um at fáa broytt byggisamtyktina eftir uppruna umsóknini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at byggisamtyktin verður broytt sambært rættaða kortskjalinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 8. februar 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 25. februar 2010:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Seinasta freist at koma við mótmælum ella broytingaruppskotum til serstøku byggisamtyktina var 19. apríl 2010.

Kommunan hevur móttikið eitt mótmæli frá sethúsaeigarum á Óðinshædd.

Lýsing av mótmæli og tilmæli koma til fundin.

**Ískoyti:**
Í mótmælinum frá sethúsaeigarunum á Óðinshædd er eingin ávís grundgeving fyri mótmælinum, men bert víst til kunngerðina í bløðunum.

Seinast tá ið byggisamtyktin fyri hetta øki var broytt høvdu sethúsaeigarunum á Óðinshædd eisini eitt mótmæli har tey m.a. pástanda, at broytingin kemur at ávirka bústaðarøkið við øktum larmi.

Til hetta er at siga, at hendan justeringin av markinum millum bústaðarøki og vinnuøki er so lítil, at tað ikki kemur at ávirka íbúgvarnar í økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at halda fast um ætlaðu broytingina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. apríl 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 28. apríl 2010:** Einmælt samtykt.

**69/10** **2007-1719**

**Serstøk byggisamtykt fyri "Útstykking 200" eystan fyri Karlamagnusarbreyt.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
"Útstykking 200", eystan fyri Karlamagnusarbreyt og norðan fyri Hoyvíkar skúla, er uml. 22.000 fermetrar til støddar. Henda útstykking liggur í einum A3 øki, sum sambært byggisamtyktini, kann nýtast til bústaðir.

63 grundøki, ið eru 200 fermetrar til støddar. Samlaða grundøkið er 300 fermetrar fyri hvørt, har uml. 100 fermetrar verða lagdir til fríøki, sokallað Tún. Túnini eru 3 í tali, og liggja hesi við atgongd frá Karlamagnusarbreyt.

Atgongd verður til alla útstykkingina frá Karlamagnusarbreyt. Í uppskotinum eru 3 atkomur. Framvið útstykkingini á atkomusíðuni móti Karlamagnusarbreyt, verður ein býlingsvegur, ið kann nýtast, um tørvur skuldi verið á tí. Hetta kann t.d. verða galdandi um ein av atkomuvegunum er ringur at koyra eftir í t.d. hálku ella av aðrari orsøk.

Atkomuvegurin leiðir bilar og fólk inn til Túnini, ið verða savnandi fyri býlingin. Frá Túnunum verða minni húsavegir inn til tey einstøku húsini. Øll felagsparkering, renovatión, møguliga postskipan, bilavask o.a. og spæl verður miðsavnað um Túnini.

Til hvørt Túnið hoyra uml. 20 hús. Húsini standa á einum grundøki, ið eru uml. 200 fermetrar til støddar. Húsini eru 8,75 x 6,25 metrar til støddar, úthúsini/bilhúsini eru 5,50 x 3,75 metrar til støddar. Planering og sokklar til húsini og úthúsini/bilhúsini verða staðsettir av TK.

Staðsetingin av húsum og úthúsum/bilhúsum verður samtykt í eini serstakari byggisamtykt fyri "Útstykkingina 200", eystan fyri Karlamagnusarbreyt

Nú er eitt uppskot til serstaka byggisamtykt fyri "Útstykking 200" gjørt.

Serstaka byggisamtyktin ásetur treytir fyri bygging v.m. og nágreinar ymisk viðurskifti í økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at uppskotið um serstaka byggisamtykt fyri ”Útstykking 200” verður góðkend.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. juni. 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 21. juni 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Nú avgerð er tikin um at fara í gongd við útstykkingina við Mylnutjørn, hevur umsitingin gjørt uppskot til at tillaga ætlanina soleiðis, at tað slepst undan at byggja brandmúrar ímóti grannamarki. Eisini er uppskot gjørt til at geva loyvi til at byggja karnappar, svalar o.a. eftir at fyrispurningar um hettar eru komin frá teimum sum hava fingið tillutað stykkir.

Tí hevur umsitingin gjørt uppskot um broytingar í serstøku byggisamtyktini hesum viðvíkjandi.

Tær flestu broytingarnar eru í § 4 um bygging, stødd, staðseting og snið húsanna.

Serstaka byggisamtyktin verður løgd fram á fundinum og uppskot til broytingarnar verða gjøgnumgingnar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at uppskotið um broyting av serstøku byggisamtykt fyri ”Útstykking við Mylnutjørn”, j.nr. 2007-1719/12, verður góðkend.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 24. februar 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

**Býráðið 25. februar 2010:** Einmælt samtykt við tí ískoyti, at heiti skal broytast til “Útstykking við Myllutjørn”.

**Ískoyti:**
Seinasta freist at koma við mótmælum ella broytingaruppskotum til serstøku byggisamtyktina var 19. apríl 2010.

Kommunan hevur móttikið tvey mótmæli/broytingaruppskot.

Tað eina mótmæli er felags frá 14 av keyparunum og snýr seg um avmarkingarnar av vindeygum ímóti marki.

Hitt mótmælið/broytingaruppskotið snýr seg um møguleika at samanbyggja sethús og bilhús og at nýta bilhústakið til altan.

Ummæli av mótmæli/broytingaruppskotum og tilmæli koma til fundin.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. apríl 2010:** Nevndin samtykti at at beina málið í bygginevndina til ummælis áðrenn støða verður tikin.

**Býráðið 28. apríl 2010:** Tikið av skrá.

**70/10** **2009-0269**

**Val av 5 limum í kollegiunevndina fyri 4 ár.**

**Býráðið 29. januar 2009:** Vald vórðu Katrin Gaard, Bjarni Dahl, Tóri á Kák Olsen, Mads A. Winther og Gunnar Mohr.

- Tóri á Kák Olsen, sum er limur í kollegiunevndini er fluttur av landinum, tí skal nýggjur limur veljast.

**Býráðið 28. apríl 2010:** Einmælt samtykt at velja Jógvan Arge í kollegiunevndina.

**FUNDUR LOKIN KL. 20.30**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Sjúrður Olsen | Bogi Andreasen |
| Marin Katrina Frýdal | Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Annfinn Brekkstein | Vagnur Johannesen | Levi Mørk |
| Maria H. Olsen | Jákup Símun Simonsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |